# Vatn frá Føroya Bjór

TÍÐINDASKRIV

Í næstu viku kemur Føroya Bjór á marknaðin við føroyskum vatni í 0,5 liturfløskum stendur í tíðindaskrivi frá fyritøkuni, sum heldur fram: - Vøruúrvalið hjá Føroya Bjór kenna allir føroyingar, og tað er eisini meira enn so komið fyri, at Føroya størsta bryggjarí hevur fingið viðurkenningar uttanlands fyri sítt øl.

Føroya Bjór arbeiðir eisini støðugt við at menna sínar vørur, og væl kenda búmerkið við veðrinum fevnir nú ikki longur bara um øl, sodavatn og saft.

Í næstu viku kemur Føroya Bjór nevniliga á marknaðin við vatni í 0,5 liturfløskum. Talan er um reint og leskiligt føroyskt vatn, sum er ein av heimsins bestu ráværum, og sum Føroya Bjór sjálvandi eisini altíð hevur brúkt til síni sløg av øli og sodavatni.

Serliga til ítrott, men ikki minst eisini aftur við eini góðari máltíð hóskar gott vatn. Seinastu árini eru fólk í Europa og okkara grannalondum annars rættiliga farin at leggja seg eftir at drekka vatn, sum jú hvørki fitar ella inniheldur sukur, men bert sløkkir tostan.




Nú ber so fyri fyrstu ferð til at leska sær við reinum føroyskum vatni í snøggum fløskum, sum listamaðurin Edward Fuglø hevur gjørt etikettina til stendur í tíðindaskrivinum.

# Restorff og NORRØNA

TÍÐINDASKRIV

Vørur frá Restorffs verða nú eisini at fáa umborð á flaggskipi føroyinga, Norrønu. Í tíðindaskrivi frá fyritøkuni verður sagt, at tað vil gleða tey 42,3 % av øllum føroyingum, sum eru Restorffs drekkarar, at fløskuøl frá Restorffs verður at fáa umborð á nýggju Norrønu. Restorffs Víst verður á, at bryggjaríið er fegið um heiðurin at verða umborð á Norrønu soleiðis at bæði føroyingar og fremmandafólk hava høvi til at leska seg við kvalitetsbryggi frá Restorff sum er 100 % vistfrøðiligt við ongum kemikalium og haldevnum í. Norrønna og Restorffs gera Føroyar størri stendur í tíðindaskrivinum.









Vikuskifti

Nr. 79 • leygardagur • 26. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Við heystlombum í Ásmundarskor

Annan páskadag fóru vestmenningar við heystlombum í fitilendi í Ásmundarskor.



Lesið síðu 3



*– Tað er løgið at vera dani í Føroyum. Tú umboðar eitt hjálandaveldi, men samstundis ert tú eisini í etniskum minniluta. Yrkingasavnið viðger eitt evni, sum ikki hevur verið skrivað um fyrr, sigur Ole Wich, sum er grafikari, teknari, yrkjari... ja stutt sagt ein »multimaður«*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Hugflogið setur mørkini

Ole Wich er dani, men hevur ein stóran part av lívinum búð í Føroyum. Hann er eitt slag av »multimanni«, sum ígjøgnum tíðirnar hevur fingist við grafikk, tekning, tónleik, yrking, myndatøku og mangt annað. Fyri stuttum fluttu Ole, konan og báðir synirnir aftur til Føroya eftir at hava búð í Danmark í sjey ár

SAMRØÐA

*Ingrid Bjarnastein*

Útbúgvingin, hann hevur, er grafikari. Hann tekur sær av grafiskari framleiðslu, sum eitt nú at gera faldarar, umsløg til bøkur, teknað frímerki og annað. Ole Wich var fyri fyrst ferð í Føroyum í 1973. Tá var hann her við danska herinum, í- flotanum. Orsøkina til, at hann kom til Føroya um tað mundið sigur hann vera, at áðrenn hann kom kendi hann Kristian Blak í Tutl, og tí kom hugskotið at koma til Føroya honum til hugs.

– Í 1973 var eg her í tríggjar mánaðir. Vit sigldu við 12 fjórðingamarkið við sjóverjuskipinum »Hvidbjørnen«, greiðir Ole Wich frá, meðan vit sita inni í arbeiðsrúminum í húsunum hjá teimum á Grønlandsvegnum.

### Vitjaði fleiri ferðir

Aftaná sína fyrstu vitjan var Ole aftur fleiri ferðir í Føroyum. Í 1976 var hann her og ferðaðist og í 1978 var hann aftur á klettunum. Tá var hann her í fimm mánaðir og millum annað skipaði hann fyri eini tónleikarundferð. Í 1979 var Ole í Føroyum í sambandi við eina framsýning, sum hann gjørdi fyri Fornminnissavnið.

– Hetta árið var altjóða barnaár, so vit settu eina fotoframsýning upp, sum æt »Barn í Føroyum«. Í 1980 flutti eg til Føroya, og her búði eg til 1996, tí tá skuldi konan niður í lestrarørindum. Nú er hon liðug, og nú eru vit so komin uppaftur, sigur fryntligi grafikarin.

Ole kom aftur til Føroya í september í fjør, og konan og synirnir komu síðani í november mánaði.

– Ja, mær dámar væl her. Annars hevði eg ikki búsett meg her, sigur Ole, tá hann verður spurdur um, hvørt honum dámar væl í Føroyum.

Dagliga starvast Ole Wich á Team 85.

*Framhald á síðu 2*